# Stórfingin útgávudagur

*Dagurin í gjár má metast sum stórur bókadagur, sum stóð í ávísum tekini. Nevniliga W. 3 forløg løgdu hvør sína bók fram, sum allar hava samband við føðingardag William Heinesens, ið er leygardagin. Bøkurnar verða alment lagdar fram á samkomu fríggjakvøldið í Kommunuskúlanum*

DAGFINN OLSEN

í gjár boðaðu 3 forløg til tíðindafundar. Tey løgdu hvør sína bók fram, og allar 3 bøkurnar koma út í samband við 100 ára dag William Heinesens, ið verður leygardagin.

**Veingjaða Myrkrið**

Niels Jákup Thomsen frá Bókadeild Føroya Lærarafelags legði fram bókina Veingjaða Myrkrið.

Bókin kom upprunaliga út í 1953. Edvard fekk fyri mongum árum síðani hugskotið at myndprýða eina søgu hjá Williami og hann byrjaði longu í 1993. Í 1998 kom ferð á arbeiðið. Úrslitið er ein flott skreyt bók, ið vendir sær til børn, men sum alt húskið kann savnast um.

At bókin eisini kemur út á donskum og íslendskum má metast sum viðurkenning til Edvard og myndir hansara.

**William og Elinborg fyrimyndir**

Spurdur um, hvussu tað er at seta myndir til søgu hjá einum, ið eisini hevur tikist við at myndprýða, sigur Edvard, at hann avgjørt hevur William Heinesen og Elinborg Lützen sum fyrimyndir. Myndir teirra hava ávirkað Edvard í stóran mun.

Edvard leggur dent á, at tað er við djúpari virðing fyri Williami, at hann hevyr myndprýtt Veingjaða Myrkrið.

**Stjørnuskaldið**

Vár í Ólavsstovu umboðaði Skúlabókagrunnin, ið gevur út Stjørnuskaldið undir Varða.

Hon segði, at William Heinesen hevur verið saknaður innan føroyska skúlaverkið og at henda bók vendir sær til miðnámsskúlar, men eisini almenningin.

Í bókini eru mangar av myndum Williams og Skúlabókagrunnurin gevur eisini út plakat og tvey postkort í samband við 100 ára dag Williams.

**William ummælir fargrar listir**

Forlagið Fannir gevur út bókina William ummælir fagrar listir. Mentamaðurin Jóhannes Enni, sáli, fekk hugskotið til bókina og hann savnaði tilfarið saman, sum Árni Dahl og Marianna Debes Dahl hava valt úr. Jóhannes Enni andaðist í apríl.

Árni Dahl metir, at William er sera fjølbroyttur ummælari, ið eisini sýnir góðan vilja. Onkur fanst t.d. at Hans A, Djurhuus, at hann skrivaði ov nógv. Wiliam segði tá, at ein eins væl kundi biða sangfugl um at tiga.

Tilfarið í bókini er frá 1924 til 1984. Árni Dahl minnir á, at nógv er broytt. Tá koma kanska ein bók 4. hvørt ár. Í dag koma eini 150 árliga.

William og Heðin Brú stjórnaðu undir krígnum blaðsíðum í Sosialinum, ið nevndust Føroyar í dag. Fyri at lýsa tíðina, hevur forlagið valt at nýta blaðhøvdini frá tíðarskeiðinum, sum tær ymsu greinarnar eru úr, og gevur hetta fráliíka tíðarmynd. Í bókini er eisini listi yvir tey, ið ummæld eru í bókini.

Allar bøkurnar verða lagdar fram á samkomu í Kommunuskúlanum fríggjakvøldið 14. januar.



*Forlagið Fannir, Føroya Skúlabókagrunnur og Bókadeildin hjá Føroya Lærarafelag hava givið hvør sína bók út í samband við 100 ára William Heinesens*



*Annika Hoydal gevur nýggja fløgu út við yrkingum eftir William Heinesen*

## Annika og William

Annika Hoydal gevir í samband við 100 ára dag William Heinesens út fløgu. Hon hevur sett orð til yrkingar eftir William og fløgan nevnist Stjerner mine venner.

14 løg eru á fløguni, sum John von daler hevur havt tónlistarligu ábyrgdina av.

Annika kenur um eina viku til Føroya á konsertferð.

Bróður Anniku, Gunnar Hoydal, eigur inngangsyrking og tekst um William, sum Annika og Gunnar kendu sum børn.

Ein sera snøgg fløga, sum plátufelagið Ambia Music gevur út.

## Stjørnuskaldið



Heinesens heiðarar Føroya Skúlabókagrunnur hetta mæta skald okkara við einum savni, sum serliga er ætlað miðnámsskúlunum, men sum í sínum fjølbroytni eisini er bók, sum almenningurin og hin kræsni William lesarin fær sína gleði av. Leikandi løttu týðingarnar av tekstunum er ein gáva til tann føroyska lesaran. Tekstirnir eru allir týddir til hesa úutgávuna og høvuðsdenturin er lagdur á at flyta William varlig aog neyvt yvir í føroyskt, og eisini er dentur lagdur á at varðveita stevið og tónan í máli hansara.

Stjørnuskaldið undir Varða er savn við myndum, tónum og tekstum eftir William Heinesen. Úrvalið er skipað eftir høvuðsevnum í skaldskapi hansara. Savnið er býtt í tríggjar høvuðspartar, ið eita Fólk og samfelag. Lívgevandi máttur og Tilverufatan. Flestu tekstirnir hava ikki áður verið útgivnir á føroyskum og eru í fullari longd fyri at geva eina heildarfatan av tí tekstaslagi og evnisøki, sum tekstirnir umboða.

Ymisk skaldskaparsløg og myndasløg eru umboðað í savninum og savnið fevnir um øll øki innan listaliga og bókmentaliga virksemi William Heinesens.

William var heimsborgari, hevur lisið heimsbókmentirnar, kendi teir stóru tónasmiðirnar, myndlistina og heimspekina. Hann skrivaði á donskum, og tí gingu nøkur ár, áðrenn føroyski lesarin tók William til sín sum føroyskt skald. Hugflog Williams fevndi víða, frá gerandisligu smáhendingunum til óendaligu og órannsakiligu stjørnurúmdina. Hann sat uppi undir Varða í Havn í lítlu smáttu sínari og skapti heimsbókmentir. Nógv spyrja, hví William skal týðast til føroyskt, tí at ein týðandi partur av skaldskapinum er tað serstaka danska málið hjá honum. Til hetta er at siga, at serliga í skúlahøpi er William ikki nógv lisin í føroyskum, tí nógvir av tekstum hansara enn bara eru á donskum. Hetta hevur verið stórur missur fyri føroyskan skúlaungdóm, og vónandi fer hetta savn at gagna bæði føroyskum skúlaungdómi og bókmentaáhugaðum við. Endamálið við savninum er at geva eina fjøltáttaða lýsing av listamanninum Williami Heinesen.

Ann Ellefsen og Kristinbjørg Høgnesen, studentaskúlalærarar, hava staðið fyri úrvalinum, hava skrivað um rithøvundin og skrivað inngangirnar til einstøku evnistættirnar í savninum. Axel Tórgarð hevur týtt stuttsøgurnar, Gunnar Hoydal yrkingarnar og Zakaris Svabo Hansen greinirnar. Knút Olsen skrivaði nótarnar til Tívilsdøtur eftir lagi hjá Williami.

Í sambandi við bókarútgávuna hevur Skúlabókagrunnurin eisini givið út eina plakat við myndevni úr Sjúrðarkvæðunum og tvey postkost, sum eru gjørd úr myndum úr bókini.

Bókin er 195 síður í litum og kostar 170 krónur.

## William ummælir fagrar listir

William Heinesen,sum vit minnast, nú 100 ára føðingardagur hansara stendur fyri durum, skrivaði bøkur sínar á donskum. Tað vita øll. Men fæstu munnu vita, at hann eitt langt lív skrivaði greinir og hugleiðingar á føroyskum í tíðarritum og bløðum.

Mentamaðurin Jóhannes Enni, sáli, savnaði alt hetta tilfarið og burtur úr tí hava Marianna Debes Dahl og Árni Dahl gjørt eitt úrval, sum forlagið Fannir gevur út undir heitinum »William ummælir fagrar listir«. Hetta eru umrøður og ummæli, ið William Heinesen skrivaði í árunum frá 1924 til 1984. Talan er um tilsamans 46 greinir, tól kunnu vit nevna bókmentagreinir, fimtan bókaummæli, ein er um leiklist, fimm um tónlist, níggju um myndlist, og fýra kunnu vit rópa orðadrátt.

Aftast í bókini eru evnisyvirlit og navnaskrá.

Ingi Joensen hevur evnað kápuna til. Har nýtir




hann málningin »Fjallaoyggjar«, sum Jacob Olsen, vinmaður Williams, málaði. Forlagið Fannir gevur út.

Bókin er 230 síður. Hon fæst bara innbundin og kostar kr. 250,-

## Veingjaða Myrkrið

Edward Fuglø hevur myndprýtt bókina og Gunnar Hoydal skrivaði formælið og týddi søguna úr donskum

Tað eru fleiri ár síðan, Edward Fuglø settir sær fyri at myndprýða eina stuttsøgu hjá Williami Heinesen. Søgan, hann valdi, er avgjørt ikki tann lættasta at fara í holt við, tí mest sum øll søgugongdin er í myrkri: Hon byrjar í skýmingini, men so er tað einans lyktin hjá børnunum, sum lýsir í bølaniðuni, tí søgan fer fram fyrst í øldini, áðrenn elektriska ljósið hevði rikið myrkrið og alt tað, ið har goymdi seg, út úr húsunum og av alfaravegi. Edward valdi tó júst hesa søguna, tí hon snýr seg um børn, og hann hevur alla tíðina havt barnið í huganum, tá ið hann teknaði myndirnar.



Men hóast uppgávan var torfør, hepnaðist tað Edwardi so væl at myndprýða søguna við 18 stórum myndum, at forløgini Gyldendal í Danmørk og Mál og Menning í Íslandi gjørdu av at geva bókina út saman við okkum. Henda útgávan av Veingjaða myrkrinum kemur sostatt samstundis út í Føroyum, Danmørk og Íslandi.

Søgan sjálv er sonn perla, sum kann verða lisin á ymiskum stigum, alt eftir hvør lesarin ella áhoyrarin er. Lesa vit søguna beint fram, snýr hon seg í stuttum um gentuna Antoniu, sum, saman við lítlabeiggja, verður send ørindi til húsini hjá einum manni, ið býr uppi í haganum. Antonia er viðkvom genta, á gáttini at stíga inn í vaksnamannaheim, og tað skal ikki nógv til, fyrr enn hon ímyndar sær myrkrið fongt við løgnum og óunniligum verum úr hennara egna hugaheimi. Men myrkrið og ræðslan má dvína fyri ljósinum, fyrst, tá ið tey koma til húsini uppi í haganum, og so at enda, tá ið tey á heimleiðini hitta ein vaksnan mann. Lítlibeiggi er glaður, men Antonia er illa til passar, nú hon so brádliga verður skrykt út úr veingjaða myrkrinum aftur.

Veingjaða myrkrið er stór skreytbók. Hon er 42 bls. í litum, innbundin í stíva permu og kostar 149,- kr.





*Sigrid Rasmussen, til vinstru, leggur seg nú eftir eini nýggjari karrieru í Noregi. Samstarvið í bólkinum Grace er steðgað*

# Grace eru givnar

*Sigrid Rasmussen leggur seg nú eftir eini nýggjari tónleikakarrieru í Noregi. Vónin um at fáa altjóða gjøgnumbrot við bólkinum Grace er horvin*

Dreymurin hjá føroysku Sigrid Rasmussen um at fáa altjóða gjøgnumbrot í norska poppbólkinum Grace er brostin.

Bólkurin er nú upploystur, og í staðin fer Sigrid at leggja seg eftir at fáa eina nýggja karrieru í Noregi.

- Tað var eitt stórt upplivilsi at verða við í Grace. Eg upplivdi eina rúgvu, kom at kenna meira til tónleikaheimin og havi møtti nógvum spennandi fólki. Men tað bar ikki til at halda fram, greiður Sigrid Rasmussen frá úr Oslo, har hon býr.

Orsøkin til, at Grace datt niður fyri er, at ein av teimum trimum gentunum í bólkinum fór burtur úr og valdi at leggja seg eftir eini solokarrieru. Higartil hevur tað verið uttan tað stóra gjøgnumbrotið.

Sigrid og hin, sum var eftir í bólkinum, ætlaðu fyrst at halda fram. Plátufelagið Sony helt, at í Grace skuldu verða tríggjar gentur, og tí vórðu fleiri kvinniligir sangarar royndir í bólkinum.



Men royndin at fáa eina nýggja gentu við í bólkin miseydnaðist. Eingin av teimum, sum royndi seg, stóð royndina, og tí hildu tær báðar, sum eftir vóru í Grace, at tær skuldu halda fram sjálvar.

- Vit høvdu 3 ár við royndum, og tað vísti seg at vera sera trupult at fáa eina nýggja gentu við í bólkin. Tí góvu vit upp.

**Samstarvið steðgaði**

Tær báðar, sum eftir vóru í Grace, gjørdu klárt til eina nýggja útgávu, men Sony tók sær góða tíð við hesum projekti, og endin var, at tað steðgaði, tá tær báðar gjørdu plátufelagnum greitt, at hendi einki beinanvegin, so sleptu tær endanum. Boðini frá Sony vóru, at so mátti samstarvið heldur steðga.

- Eg eri als ikki firtin inn á Sony, sjálvt um eg haldi, at teir skuldu havt satsa meira uppá okkum. Vit hava einki umboðsfólk havt, og tí hava vit arbeitt tætt saman við Sony, og tey í felagnum eru framvegis áhugað at hoyra tað tilfar, sum eg í framtíðini fari at gera, sigur Sigrid Rasmussen.

Men um tað kann hava við sær ein plátusáttmála við Sony, vil Sigrid als ikki meta um. Tað veldst alt um, hvat kemur burtur úr arbeiðnum framyvir.

*- Vit høvdu 3 ár við royndum, og tað vísti seg at vera sera trupult at fáa eina nýggja gentu við í bólkin. Tí góvu vit upp, sigur Sigrid Rasmussen*

**Fleiri møguleikar**

Sigrid Rasmussen syngur framvegis nógv, hóast Grace er farið í søguna. Hon syngur millum annað í kirkjum og til onnur tiltøk.

Men gongst sum ætla fer hon at samstarva við framleiðaran hjá Grace, David Erikssen. Men aðrir møguleikar eru eisini.

- Tá ein hurð verður latin aftur, letur onkur onnur hurð seg upp. Soleiðis er eisini í mínum førði. Nú Grace er upployst, kann eg finna mær onnur fólk at samstarva við, sigur hon.

- Men eg skal finna mín nýggja stíl, og eg ætli mær at smíða, meðan jarnið er heitt. Eg ætli mær at brúka tær kontaktir, sum eg havi fingið í tónleikaheiminum, og hvat fer at spyrjast burtur úr tí, fer tíðin at vísa.

Sigrid Rasmussen fór í 1995 til Noregs at arbeiða sum genta í húsi. Hon kom alt í einum fram í eini norskari sjónvarpssending, har hon skuldi syngja ein sang. Seinni fann hon saman við teimum, sum komu at manna bólkin Grace, og tað var lagt upp til, at bólkurin skuldi út í heimin at royna seg.

Grace gjørdi sjónbandalag til MTV, og hetta lag var eisini at síggja onkuntíð. Bólkurin spældi eisini í útlondum, men stóra gjøgnumbrotið kom ongantíð. Tá eini limurin í bólkinum so valdi at royna seg við solokarrieru, tók tað beinini undan bólkinum.

Nú roynir Sigrid Rasmussen at fóta sær í norska tónleikaheiminum, og stendur tað til hana, fer hon ikki í gloymibókina uttan víðari.